# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio** *á Rás2*
*hósdagin kl. 16.05*




# Fiat Punto EVO



**Nýggi Fiat Punto Evo, sum er ein sera væl útgjørdur og tøkniliga framkomin bilur, er ein tann mest økonomiski og minst dálkandi bilur á marknaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fiat Punto Evo er ein evolutión ella víðari útvikling av Grande Punto, sum hevur verið á marknaðinum síðan 2005 og hevur verið ein sera væl umtóktur bilur í Evropa.

Hóast Punto Evo líkist forgangaranum, er hann heilt broyttur, bæði uttan og innan. Fleiri designbroytingar eru gjørdar eins og intrumentborðið er heilt nýtt. Størstu broytingarnar við Punto Evo eru á tøkniliga økinum. Sum tann einasti bilur í sínum klassa hevur hesin Blue&Me-system í Dynamic útgávuni. Skipanin gevur t.d. møguleika fyri at tilseta MP-3 avspælara, sum kann stillast frá rattinum og hondfrítt Bluetooth-samband við fartelefonina, eins og eina nýggja skipan hjá Fiat, ið nevnist ecoDrive- program, sum hjálpir bilførarанum at koyra so økonomiskt sum til ber.

Allir motorarnir eru sera økonomiskir og lúka tey strongu ES-krøvini til CO útlát, sum koma í gildi í 2015. Í hesum sambandi eru Fiat komnir við eini heilt nýggjari kollveltandi teknologi, sum nevnist MultiAir, sum ger Punto Evo til ein tann mest økonomiska og minst dálkandi bil á marknaðinum.

MultiAir gevur motorinum mest møguliga kraft uttan at tað gongur út yvir forbrúkið. MultiAir tøknin er útviklað í sambandi við Formel 1 motorar hjá Ferrari, sum hoyra til Fiat Group.

Punto EVO hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir og er ein tann tryggasti í sínum klassa við t.d. sjey airbag, Hill Holder og ESP sum standard. Punto Evo fæst við trimum og fimm hurðum í útgávunum: Active, Dynamic og Sport. Bilurin fæst við trimum 1,4 litra bensinmotorum við ávikavist 77, 105 og 135 hk, har teir báðir seinnu eru MultiAir, og trimum MultiJet dieselmotorum við 75, 95 og 120 hk. Automatiskt stop/start er standard í øllum Punto Evo.

Fiat Punto Evo kann síggjast og roynast hjá á bilasøluni Nordcar við Velbastaðvegin í Havn. Prísir úr 150.000 krónum.

# Elbilar á dagsskránni

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir Jens Kristian Vang*

Týsdagin var tingbólkurin hjá Javnaðarflokkinum á kunnandi fundi hjá Elfelagnum SEV um framtíðarætlanir við el- og alternativari orku og um Grana-verkætlanina, sum eisini umfatar elbilar. Eftir fundin koyrdu nakrir av tinglimunum heim í Løgtingið í einum av elbilunum hjá SEV.

Elbilarnir, sum SEV hevur leigað til royndarkoyring í Føroyum, verða í hesum døgum royndarkoyrdir av m.a. einstaklingum, fyritøkum og stovnum kring landið.




*John Johannesen, løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin, á veg heim í Løgtingið við einum av Citroën C1 elbilunum hjá SEV saman við Finn Jakobsen frá SEV*



*Nøkur av teimum sum kunnaðu seg um framtíðarætlanirnar hjá SEV f.v.: Andreas Petersen, Mikkjal Sørensen, Eyðgunn Samuelsen, Oluffa Joensen, skrivari hjá Javnaðarflokkinum, John Johannesen og Eyðgunn Samuelsen*